## Krútsterkir spaniólar



Føroyska U19 landsliðið við monnum møtti yvirvøldini í dystinum móti Spania í fyrsta dystinum í EM undankappingini fyri U19 lið, sum verður spæld í Hvítarusslandi. 5-0 gjørdist úrslitið eftir at støðan var 2-0 í hálvleikinum. Spania hevur vanliga sera sterk ungdómslandslið, og í so máta er hesin árgangurin einki undantak., og við heimasíðuna hjá FSF sigur Karl Vidtfeldt, FSF-starvsnevndarlimur og ferðaleiðari á ferðini til Hvítarusslands, at hann er ikki í iva um, at talan var um komandi heimsstjørnur, sum føroysku unglingarnir spældu ímóti í gjár. Tað, sum iðraði føroyingar var, at støðan bert var 3-0, tá fimm minuttir vóru eftir av dystinum. Móti endanum fingu spaniumenn tvey mál afturat, og tað áttu teir ikki at fingið, vóru føroyingarnir samdir um. Føroyska U19 landsliðið skal leygardagin spæla móti Sveis

## 1. deild í bíðistøðu

Bert ein dystur verður spældur í 1. deild hetta vikuskiftið. FSF hevur gjørt broytingar, nú U19-landsliðið er uttanlands, og hetta gevur samstundis rúm fyri at avgreiða útsettu dystirnar, sum hava verið í deildini. Soleiðis er dysturin hesa ferð millum Víking og TB, og hósdagin spæla HB og KÍ eisini sínamillum dyst, sum hevur bíðað. Tá hesir eru avgreiddir, hava øll liðini tríggjar dystir eftir at spæla, og so er veruliga klárt at fara undir endaspurtin í deildini.

# Hvirlan og Stuttleikir á Tórsbreyt sunnudagin

**Nú fáa børn upp til 10 ár høvi at royna seg, á Tórsbreyt, í teimum trimum høvuðsgreinunum í frælsum ítrótti: lop, kast og renning, skrivar Hvirlan**

FRÆLSUR ÍTRÓTTUR
*Tíðindaskriv*



*Ætlandi skuldu stuttleikir haldast við Læraraskúlavøllin, men nú Tórsbreyt verður tikin í nýtslu leygardagin, verða leikirnir fluttir*

Tórsbreyt verður tikin í nýtslu leygardagin 4. okt. kl. 15, tá verður stórt hátíðarhald á økinum. Hetta hevur eisini við sær, at Hvirlan útsetur sítt tiltak til dagin eftir, fyri at kunna hava nýggju vøllirnar við sínum fullkomnu umstøðum at vera karmur um stóra barnatiltakið. 5. okt. Frá kl. 14 til 16 verður tiltakið, ið ber heitið “Stuttleikir”, so á Tórsbreyt. Tilmelding fer fram á staðnum frá kl. 13.30, og luttøkugjaldið er 50 kr, sum fólk skulu hava í reiðum peningi, - og ongantíð betur, um tey koma við “akkurát fyri”, so avgreiðslan verður skjót.

Leikirnir eru bæði ætlaðir sum lítil sýnisgluggi til, hvat ein kann íðka, tá ein frælsast, umframt ein framvísan av øllum frælsaøkinum, tá ein rúgva av virksemi er í gongd í senn.

Leikirnir eru skipaðir sum tríkampur, har hvør íðkari luttekur í bóltkasti, longdarlopi og 60 m renning. Tíðir og longdir verða skrásettar á skreytblað, sum íðkarin fær til tilmeldingina. Tá hann hevur luttikið í øllum trimum greinum, fær hann heiðursmerki fyri hetta. Alla tíðina, so leingi leikirnir vara, kunnu luttakararnir stilla seg í rekkju og vera við, men bert tríggjar ferðir verða tíðir og longdir skrásettar á skreytblaðið. Til ber eisini bara at fáast við eina grein, men luttøka í øllum trimum er kravd, skal ein gera sær vón um medalju. Til tess at børnini ikki skulu ørkymlast meir enn neyðugt, er gott hjá teimum at hava ein vaksnan við sær, soleiðis at tey finna fram til røttu rekkjurnar og fáa neyðugu skrásetingarnar á skreytblaði.

## Brückner hevur valt sær hópin

**Venjarin hjá eysturríkska landsliðnum Karel Brückner hevur í dag, 2. oktober, úttikið landsliðshópin, sum kemur til Føroya at spæla 11. oktober, og síðan skal spæla móti Serbia á heimavølli 15. oktober**

21 mans eru úttiknir, og teir eru hesir:

Málverjar: Alexander Manninger, Juventus, Jürgen Macho, AEK Athen, og Ramazan Özcan, TSG 1899 Hoffenheim

Verjuleikarar: Christian Fuchs, VfL Bochum, György Garics, Atlananta Bergamo, Ronald Gercaliu, RB Salzburg, Emanuel Pogatetz, FC Middlesbrough, Sebastian Prödl, SV Werder Bremen, Joachim Standfest, FK Austria Wien, Martin Stranzl, Spartak Moskva,

Miðvallaleikarar: René Aufhauser, RB Salzburg, Martin Harnik, SV Werder Bremen, Andreas Hölzl, SK Sturm Graz, Andreas Ivanschitz, Panatinaikos Athen, Jurgen Samuel, FC Torino, Paul Scharner, Wigan Athletics

Framherjar: Marko Arnautovic, Twente Encchede, Erwin Hoffer, SK Rapid Wien, Marc Janko, RB Salzburg, Roman Kienast, Helsingborg IF, Stefan Maierhoffer, SK Rapid Wien.

# Brak í Vági

**Stjørnan skal um vikuskiftið spæla í Vági, har VB-kvinnurnar skulu vísa, um tær nú hava styrkina til veruliga at bjóða av**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*VB líkist aftur í ár einum avbjóðara til Stjørnuna. Enntá við einum hópi, sum í nógvar mátar tykist meira robustur, enn hann hevur verið seinnu árini*

Saman við Neistanum hava VB-kvinnurnar seinnu árini roynt at bjóða Stjørnuni av.

Serliga hevur VB staðið seg væl í Vági, har tær eisini fleiri ferðir hava bast Stjørnuni, og tað er hetta, sum verður setningurin sunnudagin, tá meistararnir vitja.

Bæði liðini vunnu stórsigrar í fyrsta umfarinum, sum varð spælt seinasta vikuskiftið, og út frá hesum er ilt at meta, hvussu styrkin á liðunum er. Eingin ivi er tó um, at Stjørnan er sera væl fyri kropsliga, nú tær mest sum uttan íhald hava vant fram móti europisku uppgávuni, men hinvegin gevur intima VB-høllin mest sum eyka styrki til heimaliðið, sum sera, sera sjáldan letur mótstøðuliðini fáa nakað við sær av oynni.

Hin dysturin hetta vikuskiftið verður á Skála leygardagin, har Tjaldur uttan iva er stórfavorittur til dystin móti StÍF. Tjaldur vísti í fyrsta dystinum móti Neistanum, at tær ætla sær at spæla við í oddinum í vetur, og so hvørt sum liðið verður betur samansjóvað, er eingin ivi um, at hetta kann lata seg gera. Men tá ræður eisini um, at liðið fær fulla úrtøku í dystunum móti eitt nú StÍF.